## EM-undankappingin – úrslit og støður

**Bólkur 1**
Malta-Frakland 0-4 (0-2)
0-1: Thierry Henry, 26.
0-2: Thierry Henry, 35.
0-3: Sylvain Wiltord, 59.
0-4: Eric Carriere, 84.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Frakland | 3 | 3-0-0 | 11-1 | 9 |
| Ísrael | 1 | 1-0-0 | 2-0 | 3 |
| Slovenia | 2 | 1-0-1 | 3-5 | 3 |
| Kypros | 1 | 0-0-1 | 1-2 | 0 |
| Malta | 3 | 0-0-3 | 0-9 | 0 |

**Bólkur 2**
Norra-Bosnia/Herzegovina 2-0 (2-0)
1-0: Claus Lundekvam, 7.
2-0: John Arne Riise, 27.

Luksemburg-Rumenia 0-7 (0-4)
0-1: Viorel Moldovan, 2.
0-2: Viorel Moldovan, 6.
0-3: Mirel Radoi, 25.
0-4: Cosmin Contra, 45.
0-5: Cosmin Contra, 47.
0-6: Tiberiu Ghioane, 79.
0-7: Cosmin Contra, 87.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Norra | 3 | 2-1-0 | 5-2 | 7 |
| Rumenia | 3 | 2-0-1 | 10-1 | 6 |
| Danmark | 2 | 1-1-0 | 4-2 | 4 |
| Bosnia/Herzegovina | 2 | 0-0-2 | 0-5 | 0 |
| Luksemburg | 2 | 0-0-2 | 0-9 | 0 |

**Bólkur 3**
Tjekkia-Hvítarussland 2-0 (2-0)
1-0: Karel Poborský, 7.
2-0: Milan Baro_, 23.

Eysturríki-Holland 0-3 (0-3)
0-1: Clarence Seedorf, 16.
0-2: Philip Cocu, 19.
0-3: Roy Makaay, 30).
Útvísing: Martin Hiden, 78. (Eysturríki)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Holland | 2 | 2-0-0 | 6-0 | 6 |
| Tjekkia | 2 | 2-0-0 | 4-0 | 6 |
| Eysturríki | 3 | 2-0-1 | 4-3 | 6 |
| Moldova | 2 | 0-0-2 | 0-4 | 0 |
| Hvítarussland | 3 | 0-0-3 | 0-7 | 0 |

**Bólkur 4**
Ungarn-San Marino 3-0 (0-0)
1-0: Zoltan Gera, 49.
2-0: Zoltan Gera, 61.
3-0: Zoltan Gera, 87.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Ungarn | 2 | 1-1-0 | 4-1 | 4 |
| Lettland | 2 | 1-1-0 | 1-0 | 4 |
| Poland | 2 | 1-0-1 | 2-1 | 3 |
| Svøríki | 2 | 0-2-0 | 1-1 | 2 |
| San Marino | 2 | 0-0-2 | 0-5 | 0 |

**Bólkur 5**
Ísland-Litava 3-0 (0-0)
1-0: Heiðar Helguson, 49.
2-0: Eiður Guðjohnsen, 61.
3-0: Eiður Guðjohnsen, 73.
Útvísing: Deividas Cesnaukskis, 21. (Litava)

Týskland-Føroyar 2-1 (1-1)
1-0: Michael Ballack, 2. (br.)
1-1: Arne Friedrich, 45. (sj.mál)
2-1: Miroslav Klose, 59.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Týskland | 2 | 2-0-0 | 4-1 | 6 |
| Skotland | 2 | 1-1-0 | 4-2 | 4 |
| Ísland | 2 | 1-0-1 | 3-2 | 3 |
| Litava | 3 | 1-0-2 | 2-5 | 3 |
| Føroyar | 3 | 0-1-2 | 3-6 | 1 |

**Bólkur 6**
Grikkaland-Armenia 2-0 (1-0)
1-0: Demis Nikolaidis, 2.
2-0: Demis Nikolaidis, 59.

Norðurírland-Ukraina 0-0

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Spania | 2 | 2-0-0 | 5-0 | 6 |
| Ukraina | 3 | 1-2-0 | 4-2 | 5 |
| Grikkaland | 3 | 1-0-2 | 2-4 | 3 |
| Armenia | 2 | 0-1-1 | 2-4 | 1 |
| Norðurírland | 2 | 0-1-1 | 0-3 | 1 |

**Bólkur 7**
Turkaland-Liktinstein 5-0 (3-0)
1-0: Ökan Bürük, 7.
2-0: Ümit Davala, 15.
3-0: Ilhan Mansiz, 23.
4-0: Serhat Akin, 82.
5-0: Serhat Akin, 86.

Ongland-Makedonia 2-2 (2-2)
0-1: Artim Sakiri, 11.
1-1: David Beckham, 14.
1-2: Vanco Trajanov, 25.
2-2: Steven Gerrard, 36.
Útvísing: Alan Smith, 87. (Ongland)

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Turkaland | 3 | 3-0-0 | 10-1 | 9 |
| Ongland | 2 | 1-1-0 | 4-3 | 4 |
| Makedonia | 3 | 0-2-1 | 4-5 | 2 |
| Liechtenstein | 2 | 0-1-1 | 1-6 | 1 |
| Slovakia | 2 | 0-0-2 | 1-5 | 0 |

**Bólkur 8**
Bulgaria-Andorra 2-1 (1-0)
1-0: Georgij Chilikov, 36.
2-0: Krassimir Balakow, 58.
2-1: Anthony Lima, 80.
Útvísing: Anthony Lima, 84. (Andorra)

Estland-Belgia 0-1 (0-1)
0-1: Wesley Sonck, 1.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Bulgaria | 3 | 3-0-0 | 6-1 | 6 |
| Belgia | 3 | 2-0-1 | 2-2 | 6 |
| Estland | 2 | 0-1-1 | 0-1 | 1 |
| Kroatia | 2 | 0-1-1 | 0-2 | 1 |
| Andorra | 2 | 0-0-2 | 1-3 | 0 |

**Bólkur 9**
Jugoslavia-Finland 2-0 (0-0)
1-0: Darko Kovacevic, 54.
2-0: Sinisa Mihajlovic, 84. (br.)
Útvísing: Juha Reini, 83 (Finland)

Wales-Italia 2-1 (1-1)
1-0: Simon Davies, 12.
1-1: Alessandro del Piero, 32.
2-1: Craig Bellamy, 71.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Wales | 2 | 2-0-0 | 4-1 | 6 |
| Jugoslavia | 2 | 1-1-0 | 3-1 | 4 |
| Italia | 3 | 1-1-1 | 4-3 | 4 |
| Finland | 3 | 1-0-2 | 3-4 | 3 |
| Azerbadzjan | 2 | 0-0-2 | 0-5 | 0 |

**Bólkur 10**
Russland-Albania 4-1 (2-1)
1-0: Aleksander Kerzhakov, 3.
1-1: Klodian Duro, 15.
2-1: Sergej Semak, 41.
3-1: Viktor Onopko, 52.
4-1: Sergej Semak, 54.

Írland-Sveits 1-2 (0-1)
0-1: Hakan Yakin, 45.
1-1: Ludovic Magnin, 77. (sj.mál)
1-2: Fabio Celestini, 87.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sveits | 3 | 2-1-0 | 7-3 | 7 |
| Russland | 2 | 2-0-0 | 8-3 | 6 |
| Albania | 2 | 0-1-1 | 2-5 | 1 |
| Georgia | 1 | 0-0-1 | 1-4 | 0 |
| Írland | 2 | 0-0-2 | 3-6 | 0 |

**Venjingardystir**
Skotland-Kanada 3-1 (1-1)
0-1: Dwayne De Rosario, 9. (br.)
1-1: Stephen Crawford, 11.
2-1: Steven Thompson, 50.
3-1: Stephen Crawford, 75.

Poland-New Zealand 2-0 (0-0)
1-0: Krzysztof Ratajczyk, 51.
2-0: Mariusz Kukielka, 86.

Svøríki-Portugal 2-3 (2-1)
1-0: Jörgen Pettersson, 7.
2-0: Marcus Allbäck, 24.
2-1: Sergio Conceição, 35.
2-2: Romeu Almeida, 53.
2-3: Rui Costa, 89.

Spania-Paraguay 0-0 (0-0)

# Týskir timburmenn

**Týski fótbóltsheimurin vaknaði hósmorgunin við so svárum timburmonnum, at tað stendur eftir. Bløðini gera minst møguligt burtur úr dystinum í Hannover**

ÚRLATING
*Edvard Joensen*

**Berlin:** Týsku landsliðsleikararnir, og serliga venjarin Rudi Völler, fáa av at vita í tysku bløðunum hósdagin, meðan serliga føroyski málmaðurin, Jákup Mikkelsen, verður róstur. Tey bløðini, sum geva spælarunum karakter, eru samd um, at hann var besti maður á vøllinum.

Tað er ikki tað stóra, týsku bløðini gera burtur úr landsdystinum í Hannover mikukvøldið. Tey tosa mest um eyðmýking. Okkurt teirra vil fegið hava fram, at týskarar hóast alt vóru eitt mál betri enn Berti Vogts og hansara skotar.

Die Welt ger sera lítið burturúr. Ein stutt einteigað grein, har greitt verður systematiskt frá dystargongdini, og sagt verður, at longu eftir 35 minuttum byrjaðu týsku áskoðararnir at bríksla eftir sínum egnu leikarum.

Og tað gjørdist bara verri, tí tá dysturin endaði, var ein heil konsert av ónøgdum áskoðarum, sum kortini fagnaðu føroyingunum.

Der Tagesspiegel fegnast í síni yvirskrift um, at týskarar vóru eitt mál betri enn Berti Vogts, sum við sínum skotum bert kláraði javnleik 2-2.

Hóast týskarar vunnu, høvdu teir onga grund til at fegnast, staðfestir blaðið, sum vísir á, at tað var nær við, at bensinstøðarlærlingurin, Elttør, kundi syrgt fyri tí ultimativu eyðmýkingini í varaheimsmeistarunum.

Bild Zeitung staðfestir, at stólpin bjargaði Kahn, og vil so fegin greiða frá, at umleið eitt prosent av samlaða føroyska íbúgvaratalinum var í Hannover hetta kvøldið. Tað hevði í týskum tølum svarað til, at týskarar skuldu spælt fyri umleið 800.000 áskoðarum, sigur blaðið.

– Og móti endanum stóðu so allir hesir føroyingarnir og sungu tjóðsangin, sum rungaði um alt stadion

Bild gevur leikarunum karakter, og ein er, sum fær næsthægsta karakter. Tað er Jákup Mikkelsen, sum fær tvey, har eitt er hægst, ella »Weltklassse«, sum teir siga.

Eingin føroyingur er lægri enn fýra, meðan tann besti týskarin, Oliver Kahn, fær trý, og øll týska verjan fær fimm frá Bild Zeitung.

Eisini høvuðsstaðarpressan her í Berlin ger burtur úr eyðmýkingini, sum týskarum var fyri av hesum »fótbóltsdvørgunum«, sum føroyingar í hesum sambandi verða nevndir.

Berliner Zeitung skrivar í yvirksrift um alla opnuna:

»2:1! Rudi, áh tann eyðmýking«. Seinasta orðið, eyðmýking, er sett við sterkum, reyðum liti.

Og berlinarar halda enn meira um føroyska avrikið, enn Bild ger. Teir hava givið Jákupi Mikkelsen karakterin tvey, meðan allir hinir føroyingarnir - uttan undantak - hava fingið trý. Tríggir týskarar hava fingið trý, meðan restin liggur á fýra og fimm.

Berliner Zeitung veit eisini at siga, at Rudi Võller ikki heldur, at ein bert skal vinna 2-1 á føroyingum. Tað er í sjálvum sær ein revsing, sigur hann samb ært blaðnum.

Berliner Kurier staðfestir eisini, eins og øll hini bløðini, at týskarara hava onga grund til at gleðast um handan dystin. Eingin teirra spældi væl, sigur blaðið.

Eisini Berliner Kurier ger nakað burturúr, at týsku áskoðaarnir fóru at bríksla eftir leikarunum, tá ein hálvur tími var farin.

»Og tá Jákup Mikkelsen, sum aftasti maður, enntá fintaði Carsten Jancker á reyvina, var hetta orsøk til háðandi látur um alt stadion«, veit blaðið at siga frá.

Og týskarar, vit hittu beint eftir dystin, eru samdir við tí, sum blaðið skrivar. Ein teirra helt, at júst tann hendingin var sera symbolsk fyri leikgongdina ein stóran part av dystinum.

»Tað var tann øvugta verð. Pinkutjóðin í Norðurhøvum hevði europeiska stórveldið á reyvini,« staðfesti hann.

»Fínur dystur hjá tykkum«, helt maðurin í hotelmóttøkuni her í Berlin, tá vit komu higar hósdagin. »Føroyingar vildu vinna. Tað var munurin«, var hansara vísiliga niðurstøða.

# Tað svíður illa

**Í týsku fjølmiðlunum hava tey heilt ilt av sigrinum á føroyingum, ið als eingin sigur var kortini, men ein eyðmýking, siga bløðini aftur fríggjadagin**

EFTIRMETING
*Edvard Joensen*

**Berlin:** Eftir skelkin mikukvøldið og tomu viðmerkingrnar hósdagin, eru týsku bløðini nú løgst á venjaran, Rudi Völler, sum fær fleiri skolur yvir sín kropp.

Bæði stóru, landsdekkandi bløðini og lokala høvuðsstaðarpressan gera í fríggjadagsútgávunum viðmerkingar til dystin mikukvøldið.

Eisini hava bløðini viðmerkingar frá lesarum, eins og menn sum Franz Beckenbauer eisini eru komnir til orðanna.

Beckenbauer, sum fyrr hevur gjørt seg til talsmann fyri, at smáu tjóðirnar einki hava at gera í europeisku undankappingunum, er eitt sindur meira varin í dagsins viðmerking. Nú staðfestir hann bara at týska liðið var ikki nóg gott.

»Vi kunnu spæla væl betur enn hatta. Men tað var ikki við "Glanz- und Gloria" fótbólti, vit komu í HM finaluna«, staðfestir Der Kaiser.

Hvør skal siga. Føroyinar spældu ikki væl. Teir bardust fyri lívinum. Og teir mundu klárað enn eina heimssensatión.

Vanligi lesarin er á somu leið, sum bløðini vóru hósdagin, har tosað verður um ta fullkomnu eyðmýkingina.

Og Rudi Völler fær sítt. Staðfest verður, at hann hevur ikki gørt týskan fótbólt betri. Heldur hinvegin.

»Fyri 26 mánaðum síðan vunnu vit 4-1 á Spania. Nú klára vit bara akkurát føroyingar.« Tað er skomm, heldur Der Tagesspiegel í fríggjadagsútgávuni.

Vikuskifti

Nr. 201 • leygardagur • 19. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Í ár var onki at reypa av

Fáa staðni gera tey so nógv burturúr veðrahaldi sum í Hvalba, men í ár var veðrasýningin eitt vónbrot



Lesið síðu 4 & 5



*Uni Rasmussen, sum hevur verið blindur í meira enn 12 ár, hevur júst lokið útbúgving sum vøddamýkjari*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Ongin trupulleiki at fáa útbúgving uttan upprit

Hóast 33 ára gamli Uni Rasmussen í Søldafirði er blindur, so hevur hann ikki havt trupulleikar við at fáa eina útbúgving. Í summar varð hann útbúgvin vøddamýkjari, og hevur hann longu nógv arbeiði at tríva í

VØDDARMÝKING
*Ingrid Bjarnastein*

– Húsini eru svørt við hvítum vindeygum, og tey standa beint uppiyvir Elim.

Soleiðis greiðir 33 ára gamli Uni Rasmussen frá, tá hann skal siga okkum, hvar hann búleikast. Tá vit koma inn í stóru húsini í Søldafirði tekur systir Una ímóti okkum. Lítla løtu seinni stendur Uni í hurðini og bjóðar okkum inn. Hann vísir okkum niður í kjallaran. Ongir trupulleikar eru við at finna, og við hjálp av hondunum, so leiðir hann okkum inn í eitt lítið høli.

Uni Rasmussen úr Søldafirði er 33 ára gamal. Hann hevur verið blindur í 12 og eitt hálvt ár. Hann var úti fyri eini bilvanlukku í mars mánað í 1990, og var hann tá bert 21 ára gamal.

– Tað er sjálvsagt ein stór broyting at gerast blindur, sigur Uni Rasmussen.

– Áðrenn lærdi eg til bilmekanikara, og eg gekk á maskinskúla tá vanlukkan hendi.

Tað tók eitt sindur av tíð, áðrenn Uni fekk umstillað seg til tann veruleikan, at nú sá hann onki, men tó ikki so leingi ein kundi hugsað sær.

– Fyrstu tíðina varð eg sendur út og inn av Ríkissjúkrahúsinum, og í tí tíðini fekk eg umstillað meg nógv. Tá eg varð liðugur við allar kanningarnar, fór eg á Blindastovnin fyri at læra at klára meg sjálvan, og har var eg so í eitt hálvt ár, greiðir Uni Rasmussen frá.

### Ymisk arbeiði

Tá Uni flutti heim aftur hálvt ár seinni fór hann at arbeiða við teldum hjá Com Data. Hann hevur síðani havt ymisk telduarbeiði, men av tí, at broytingarnar innan teldurheimin eru nógvar innan stutta tíð, var ógvuliga ringt at fylgja við.

– Syntetisk tala varð brúkt, har eg arbeiddi. Tað vil siga, at forritið lesur tekstin upp, sum kemur fram á skermin. Men hetta gjørdist eitt sindur ov strævið, og Uni valdi tí at gevast.

Uni hevði áðrenn hann gjørdist blindur hugsað um at gerast fysioterapeut, ella vøddamýkjari, men hetta hevði ikki verið meira enn ein tanki, sum hann spældi sær við. Men tá danska limablaðið fyri blind lýsti við, at tey fóru at skipa fyri einum skeiði upp á tríggjar vikur fyri at síggja um áhugi var millum blind at gerast vøddamýkjarar, tók Uni møguleikan.

Níggju skeiðluttakarar vóru, har lærarin so skuldi meta um, hvørt áhugin var nóg stórur til at byrja undirvísing ella ikki. Hetta var um heystið í ár 2000.

1. februar í fjør byrjaði Uni so upp á útbúgvingina, sum tilsamans hevur tikið hálvt annað ár. Sjey av teimum níggju skeiðluttakarunum fóru undur útbúgvingina.

– Tað er ikki líka lætt at fara undir útbúgving tá tú ert blindur,

*Framhald á síðu 2*